# Svar uppá spurningar frá Hans Atla Dahl, Amplexa Genetics A/S

AKSEL V. JOHANNESEN
landsstýrismaður í heilsumálum



Í lesarabrævi, har Hans Atli Dahl, stjóri fyri Amplexa Genetics A/S, umrøður CDT kanningar, setir hann samstundis undirritaða tríggjar spurningar viðvíkjandi tí ætlan, sum føroyska heilsuverkið hevur lagt fram. Undirritaði skal eftir besta førimuni svara uppá spurningarnar.

**Hvussu nógv sjúk við CTD roknar heilsuverkið at finna og viðgera?**
Sum kunnugt, er høvuðsætlanin fyrst og fremst at bjóða øllum føroyingum eitt tilboð um kanning. Tey, ið hava sjúkueyðkenni ella eru skyldfólk við ein sjúkan, fáa bjóðað kanningina ókeypis, meðan restin kemur at gjalda 100 kr. fyri kanningarnar. Harumframt er ætlanin at kanna PKU-kortini, ið liggja hjá Statens Serum Institut (hereftir SSI).

Hvussu nógv heilsuverkið kemur at finna og viðgera, er fyrst og fremst tengt at, hvussu nógv taka av tilboðnum um kanning, og tí hevði tað verið skeivt at nevna eitt ávíst tal í hesum sambandi. Orsøkin til ætlanina at kanna PKU-kortini hjá Statens Serum Institut, sum eitt eyka átak, er, at tað verður ikki mett realistiskt, at allir føroyingar taka av tilboðnum um sjálvboðið at lata seg kanna. Við at kanna kortini, fæst ein størri trygd fyri, at meginparturin av teimum føroyingum, upp til 23 ára aldur, ið hava sjúkuna, verða funnir. Við hesum báðum kanningarháttum verður væntað, at tey allarflestu verða funnin.

*Hvussu nógvar berarar við sjúkuíleguni kann heilsuverkið kunna um teirra støðu og vegleiða um verandi uppskot við biokemisku kanningunum verður gjøgnumført?*

Tað hevur stóran týdning at leggja dent á tvey viðurskifti í hesum sambandi.

Fyri tað fyrsta er tað, sambært objektivu fakligu ráðgevingini, eg havi fingið í hesum máli, als ongin orsøk at finna berarar, tí teir eru ikki sjúkir. Hetta framgongur eisini sambært faldaranum um CTD, ið er gjørdur av Ulrike Steuerwald, barnalækna, Allan Melgaard Lund, yvirlækni á Klinisk Genetiskari Deild á Ríkissjúkrahúsinum, Fróða Jacobsen, yvirlækna og Bjarna á Steig, leiðandi yvirlækna á Landssjúkrahúsinum og sum er at finna á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum (www.hmr.fo). Í faldaranum framgongur millum annað:

*"sjálvt um berarar hava niðursett carnitin transporter virkni og tí lægri carnitin innihald í blóðinum enn tey, sum ikki eru berarar, er tað ongantíð ávíst at hava nakran týdning. Hjá berarum av CTD kennir man ikki til dømir av álvarsomum sjúkum ella deyða, sum kann setast í samband við CTD. Man hevur umhugsað, hvørt tað er øktur vandi fyri hjartasjúkum og øktum abort títtleika hjá berarum, men hetta er ongantíð ávíst. [...] Tað er higartil ongantíð ávíst nakað gagnligt úrslit av carnitin tilskoti til berarar, sostatt verður tað gjøgnumgangandi ikki viðmælt at geva carnitin til berarar.*"

Fyri tað næsta hevur Heilsumálaráðið viðgjørt tann løgfrøðiliga spurningin um at kanna og lata upplýsingar víðari frá PKU-kortunum hjá SSI, uttan at biðja um samtykki frammanundan. Hetta verður annars kravt undir vanligum umstøðum sambært "Lov om patienters retsstilling".

Niðurstøðan hesum viðvíkjandi er, at tað løgfrøðiliga er í lagi, tí kanningin, sum ætlanin er at fremja hjá SSI, hevur "*...einans til endamáls at kunna finna fram til teirra, sum óvitandi ganga runt við einari deyðiligari sjúku; men sum kunnu vera hjálpt, tá hesar kanningar verða gjørdar. Hesi atlit viga í sjálvum sær so tungt sæð í mun til inntrivið, at Heilsumálaráðið ikki metir tað vera neyðugt at innheinta samtykki frammanundan kanningunum.*" Umvent merkir hetta, at uppskoti hjá Amplexa Genetics A/S um at finna "frískar" berarar við ílegukanna PKU-kortini hjá SSI, ikki letur seg gera sambært løgfrøðiligu niðurstøðuni!

Soleiðis er svarið uppá hendan spurning, at tað loysir seg ikki at brúka tíð og fíggjarliga orku uppá at finna fram berarar og vegleiða teir í sambandi við CTD. Framyvir er tó ætlanin at byggja eina klinisk genetiska ráðgeving upp, har fólk kunnu fáa vegleiðing um ymsar genetiska sjúkur og fyribyrging av hesum í sambandi við gitna.

Harafturat letur tað seg ikki at gera út frá einum løgfrøðiligum sjónarmiði, at gera ílegukanningar av PKU-kortunum á SSI við atliti til at finna berarar, sum Amplexa Genetics A/S annars mælir til.

Harumframt skal verða nevnt, at tað er mær upplýst, at í Føroyum er kemst CTD sjúka oftast av einum íleguvarianti, nevndur N32S, men tað finnast eisini 2 aðrir íleguvariantar í Føroyum, har tann eini enn ikki er kendur og tí heldur ikki kann ávísast við ílegukanning. Av tí at tann eini ikki er kendur letur tað seg ikki gera, at Amplexa Genetics kannar allar íleguvariantarnar, sum teir annars bjóða seg til. Tí verður tað læknafakliga mælt frá at gera ílegukanningar, sum eitt screeningsátak fyri CTD, tí vandi er fyri at yvirsíggja CTD-sjúklingar, sum hava ein ókendan variant (sí áðurnevnda faldara um CTD á www.hmr.fo).

**Hvat er tíðarætlanin fyri hesa verkætlan?**
Høvuðsætlanin er sum kunnugt at bjóða eitt tilboð um kanning til allar føroyingar, so skjótt sum fígging fæst til vega. Hetta merkir, at um eykajáttanin verður samtykt í Løgtinginum, verður skipanin sett í gongd beinanvegin, soleiðis at øll tey, ið ynskja tað, verða kannað fyri CTD sjúku, so skjótt sum tey ynskja tað. Úrslitini fyriliggja innan fyri nakrar fáar dagar eftir, at fólk hava latið seg kannað.

Sum eitt eyka átak, er ætlanin eisini at kanna PKU-kortini hjá SSI. Av tí at tey føroysku kortini liggja blandað millum tey donsku, kemur arbeiðið við at finna tey fram og fáa tey kannað, at taka upp ímóti einum ári, sambært upplýsingum hjá SSI. Hendan tíðarfreist er galdandi óansæð hvat slag av kanning verður framd, tí tað sum tekur tíð, er at leita kortini fram.

# Gerið íløgur í succés´ina hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi !

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN



Nú er júst løtan, at landsins myndugleikar skulu fara inn at spara stórar peningaupphæddir. Hetta gerst best við at víðka serlæknatænastuna hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Klaksvíkar Sjúkrahús, veitir í dag tænastu á høgum støði m.a. innan arm-, bein-, mjadnar-, hond- og urinologiskurðviðgerðir. Hetta letur seg gera, tí Sjúkrahúsið hevur megnað at fingið avtalur í lag við serlæknar uttanlands. Hesir koma til sjúkrahúsið at arbeiða við jøvnum millumbili gjøgnum alt árið og geva sjúklinginum 1. klassa viðgerð, hvør á sínum øki.

Her er talan um høgt virdar og dugnaligar serlæknar uttanlanda, sum hava stóra vitan og royndir innan teirra serøki. Hesir gera minst 100 skurðviðgerðir árliga innan teirra øki. Hetta gevur teimum tí stórar royndir, sum als ikki kunnu fáast við bert at arbeiða í Føroyum. Við tað, at teir hava stóra rutinu eru teir førir fyri og megna at gera nógvar skurðviðgerðir uppá heilt stutta tíð. Soleiðis eru teir ein sera effektiv arbeiðskraft.

Klaksvíkar sjúkrahús hevur nú meira enn 20 ára royndir á hesum øki. Hetta hevur ført til, at sjúkrahúsið hevur upparbeitt eina sera vælvirkandi ekspertisu og er í dag ført fyri at veita tænastu innan hesi serøkir á høgum støði ájavnt við onnur lond.

**Starvsfólkaroyndir**
Starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevur soleiðis fingið stóra vitan og royndir at arbeiða undir serlæknum. Hettar er sera dugnaligt starvsfólk, sum serlæknarnir seta stóran prís uppá at arbeiða saman við.

**Brúka tíðina effektivt**
Umleið 90 prosent av øllum hesum serskurðviðgerðum verða gjørdar á sjálvum Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tey írestandi 10 prosentini, har tað er neyðugt at flyta sjúklingin til Danmarkar, verða hesar skurðviðgerðir kláraðar uppá heilt stutta tíð. Hetta ber til, tí serlæknin á økinum fyrst kannar sjúklingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og leggur alt til rættis sjálvur áðrenn skurðviðgerðina í Danmark.

Hetta ger, at sjúklingurin verður spardur fyri óneyðuga langa bíðitíð. Haraftrat sleppur sjúklingurin í nógvum førum heim dagin eftir.

Fíggjarliga eru eisini stórar upphæddir at spara í hotel- og ferðaútreiðslum og óivað øðrum eisini.

**Hvussu fáa vit hesir læknar at støðast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**
Um serlæknarnir fingu bjóða 1/3 fast starv við pension, vildi tað ført til, at Klaksvíkar Sjúkrahús bleiv attraktivt at søkja hjá serlæknum á høgum støði. Hesin leistur verður brúktur uttanlands við succés, og eru tey sera glað fyri hetta.

**Landsins mynduleikar, síggið henda møguleika !**
So landsins mynduleikar, tit eiga at duga at síggja møguleikar í hesi tænastu. Vit spara hópin av peningi, bæði innan ferðing og hoteluppihald. Haraftrat fær sjúklingurin viðgerðina gjørda í Føroyum á høgum støði, ájavnt við onnur lond.

Síggið møguleikan í at gera Klaksvíkar sjúkrahús til eina enn størri succés. Tit eiga at duga at síggja at hettar er vegurin fram. Handli nú skjótt, og spari nógvan pening, og gevi sjúklingum eina tænastu á høgum støði. Øll eiga at duga at skilja, at tað er er peningur at spara við at fáa nakrar serlæknar hendanvegin ístaðin fyri at senda hópin av sjúklingum uttanlands.

# Vallyfti skulu haldast

EDMUND JOENSEN



Lyftini um, at vælferðin skal koma áðrenn asfalt og betong, skulu haldast. Tí skulu tunlar ikki inn í aftur fíggjarlógaruppskotið, meðan tað liggur í fíggjarnevndini, sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin

- Vit skulu syrgja fyri at halda okkara vallyftir!

Tað sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin, í sambandi við, at fíggjarlógaruppskotið fyri 2010 er til umrøðu í Løgtinginum.

Í uppskotinum eru ætlaðu tunlarnir lúkaðir burturúr, og tað heldur løgtings- og fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum vera positivt.

- Flestir løgtingslimir fóru til val uppá, at bleytu virðini skulu koma fram um asfalt og betong. Tí kunnu vit ikki forsvara, at t..d. tunnlar eru inni aftur í fíggjarlógaruppskotinum, tá tað kemur úr aftur Fíggjarnevndini, segði hann.

Hann leggur dent á, at Føroyar eru í einari kreppulíknandi støðu, og undir verandi umstøðum er púra burturvið at gera íløgur í tunlar.

- Botnurin í landskassanum dagar nú undan. Í longdini ber ikki til at skriva út fleiri almenn lánsbrøv, sum í grundini bara er at rulla skuld framman fyri sær. Og vit kunnu heldur ikki forsvara at skriva út skuldarbrøv til komandi ættarlið av føroyingum at gjalda.

Um sjálva viðgerðina í Fíggjarnevndini, sum nú fer at byrja, sigur Edmund Joensen, at føroyingar ikki fara at góðtaka nakra lokalpolitiska dagsskrá í nevndini.

- Tí eigur meirilutin í Løgtinginum heldur ikki at góðtaka, at nøkur fá vilja umfordeila landsins virðir, sum teimum nú einaferð lystir.

- Um nøkur meining skal vera í, at Landsstýrið ger eitt fíggjarlógaruppskot, ja so er hetta uppskotið, ið Landsstýrið nú hevur latið Løgtinginum í høvuðsheitum tað, ið Tingið eigur at samtykkja.